## VIÐMERKINGAR

# Dunnuhyljar og bøgarðar í Suðuroy

**Finnleif Guttesen**
*býráðslimur á Tvøroyri*



Tíðin er komin til, at kommunalpolitikarar fara úr sínum lítla dunnuhyli og tora at hyggja út um bøgarðarnar.

Fremmanda fólk, sum lesa bløðini, hoyra tíðindi í Útvarp Føroya og síggja Sjónvarpi, kunnu fáa ta fatan, at Suðuroyggin er tvær oyggjar, ein sunnara og ein norðara oyggj, bert við tveimum býum, Vág og Tvøroyri.

Sumba, Lopra, Porkeri, Hov, Fámjin, Hvalba og Sandvík, verða ikki tiknar upp á tungu og er hettar heilt burturvið, tí tað búgva líka nógv fólk tilsaman í hesum bygdum sum á Tvøroyri.

**Ein kommuna**

Tað hevur verði tosa og skriva nógv um, at Suðuroyggin skal verða ein kommuna, undantikið Vágs býráð, sum hevur bundið seg til at siga, at tað skal verða tvær kommunur.

Mær vitandi taka allir kommunalpolitikarar í hinum seks kommunum undir við, at Suðuroyggin skal verða ein kommuna.

Men tíverri eru tað býráðspolitikkarar á Tvøroyri sum siga, "ein kommuna og at alt skal verða á Tvøroyri", og tá má sigast, at hesir eru ikki komnir úr sínum lítla dunnuhyli.

Tað sama hevur verði galdandi tá ið kommunan skal seta fólk í starv og arbeiði bjóðast út, men tíbetur er tørvurin á útbúnaði arbeiðsmegi við at broyta henda dunnuhyljapolitik.

**Arbeiðspláss**

Kommunurnar hava altíð kappast um arbeiðspláss, tí so fáa tær skattainntøkurnar.

Hendan kappingin hevur verði til meira skaða enn gagn, og høvdu vit sloppið undan hesum, um oyggin var ein kommuna.

Somuleiðis blívur sagt, at alt alment arbeiði er flutt til Tvøroyri og er tað eisini sannheit, at skrivstovur hjá Toll& Skatt, Almannastovuni, Politi og sjúkahús liggja á Tvøroyri, men veruleikin er jú, at kanska tveir triðingar av teimum sum arbeiða á hesum arbeiðsplássum búgva uttan fyri Tvøroyri og gjalda tí ikki skatt á Tvøroyri.

**Suðuroyggin manglar arbeiðspláss**

Tá landsins myndugleikar bjóða okkum arbeiðspláss, skulu vit sjálvsagt taka teir uppá orðið, hvar tey liggja er fullkomiliga líkamikið.

Tann tíðin er farin, at títt arbeiðspláss partú skal liggja á sama stað, har tíni hús standa.

**Broyting má til**

Komandi kommunuval gevur veljarunum møguleika, at velja kommunalpolitikarar, sum tora og hava vilja til at fara út um bøgarðarnar og arbeiða fyri Suðuroynni, og ikki bert fyri egnum dunnuhyli.

# Den grimme ælling

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*



Øll kenna vit hesa frálíku søguna hjá H.C. Andersen, ið byrjar so tragisk og vónleys fyri henda neyðars unga, men sum endar so vónrík og stórbærsliga, tá hesin sami ungi, sum ein vakur svani breiðir veingirnar út og vísur umhvørvinum sín rætta veruleika.

Søgan um Postverk Føroya er tann øvugta, tí tá Postverkið í 1976 var yvirtikið, var tað at líkna við ein svana, sum við luft undir veingjunum, og við stórum yvirskoti, vísti umhvørvinum hvat postverkið var, ja tá var sagt, at postverkið kom at vera ein fíggjarlig grundsoyla undir tí føroyska samfelagnum.

Men tíverri, og tað harmar meg, hevur Postverkið mist flogið, sjálvt um tað hevur sera dugnalig starvsfólk, og rekur í dag fram móti eini óvissari framtíð, bæði sum stovnur og arbeiðspláss.

**7 posthús í Føroyum.**

Í dag miðar Postverk Føroya eftir at lukka so gott sum øll verandi posthús, inntil teir eru komnir niður á uml. 7 posthús í Føroyum. So við hetta lag, fara føroyingar í framtíðini at "valfarta" til posthúsini í desember mánaða tá jólapakkin skal sendast til børn og familju uttanlands.

Skal gongdin vendast, og tað meini eg hon kann, so skal postverkið fara aktivt inn og bjóða sínar tænastur fram innan nógv fleiri økir enn í dag, sum tann tænastustovnur Postverkið er og sum hevur álit millum fólk.

**Postkassarnir.**

Í staðin fyri at brúka orku uppá at fáa fleiri inntøkur til Postverkið, so verður arbeitt við eini postkassaskipan, sum gongur út uppá, at áleggja fólki at flyta postkassan frá úthurðini og út til vegin ella settan á húsaveggin móti vegnum, fyri at spara tíð og harvið løn til postboðini, men hetta viðførir eina munandi verri tænastu, serliga fyri okkara eldru borgarar, og tí eigur postkassaætlanin at vera slept, tí henda ætlan kemur at viðføra, at tænastustøði hjá Postverkinum skavar botnin, og millum annað tí slerdi henda ætlan heldur ikki ígjøgnum í Danmark, meðan Norra royndi skipanina við tí úrslitið, at í dag verða millum 200-300.000 túsund postkassar fluttur aftur inn móti húsunum.

Og hví skulu vit so fara undir eina postkassaskipan, sum hevur spælt falit allar aðrar staðir? Eg haldi hetta er bæði meiningsleyst og provokerandi.

**Posthús í handlum.**

At hava lokal posthús í verandi handlum, meti eg er eitt frálíkt hugskot sum eigur at roynast, tí hettar hækkar tænastustøði, við tað at posthúsið kemur at kunna veita tænastur so gott sum allan dagin. Henda skipan er ikki nýggj, men førir okkum aftur til røturnar, tí hetta var tað vanliga postmynstrið í Føroyum.

Á Toftum fungeraði henda skipanin frálíka væl, við Pidda Skaale, sála, sum handils- og postmanni.

**Inntøkur.**

Eg meti, at Postverkið skal brúka krefturnar til at skapa inntøkur og tillagað tænastu sínar við at bjóða seg fram, bæði tá talan er um vanligan post, elektroniskan post, pakkapost, annan post sum spæliseðlar v.m., postgiro, fragt v.m., tí við hesum skaptist eitt innihaldsríkt arbeiðspláss fyri starvsfólkini og Postverkið hevði tryggja sítt fíggjarliga rakstrarstøði sum hevði viðført stabil viðurskifti í Postverkinum.

**Postverkið í framtíðini.**

Grundin fyri at eg eri ímóti tí negativu gongdini í postverkinum í løtuni, kemur ikki einans av lokal áhugamálum, sjálvandi eri eg ímóti og vil fora fyri at posthúsið á Toftum lukkar, men tí eg meti, at verandi gongd viðførir eina "avtøku" av postverk Føroya sum tænastustovni, og hesum takið eg ikki undir við, tí eg ynski ikki, at postverkið verður "den grimme ælling" tá talan er um tænastur, men í staðin verður tann fullkomni "svanurin" millum tænastuveitarar í tí Føroyska samfelagnum.

# Heðin pellar tvífalt

**Jógvan Arge**
*býráðslimur*



Skilji so væl, at Heðin Mortensen vil hava lagt lok á málið um tað økta barnatalið og broytta aldursbýtið á dagstovnunum.

Tað hevur fingið ilt í tey, sum arbeiða á stovnunum. Kanska serliga tí tey óttast fyri, hvat tað næsta afturstigið verður.

Fyri sjálvur at sleppa burtur úr knípuni, vil hann vera við, at bæði mentamálanevndin og fíggjarnevndin hjá býráðnum hava viðgjørt og samtykt hesa nýggju skipan.

Tað er ikki rætt. Ongin nevnd í býráðnum hevur viðgjørt málið og enn minni samtykt broytingarnar.

Málið hevur hvørki verið á skrá hjá mentamálanevndini ella fíggjarnevndini og ei heldur hjá býráðnum sjálvum.

Tað kann Heðin fáa váttað við at spyrja seg fyri hjá teirri umsiting, sum hann sjálvur er nevndarformaður fyri.

So hóast fáur sigst lúgva meir enn helvtina, so pellar Heðin tvífalt í hesum føri!

Frá okkara síðu skal ikki skorta vilji at loysa málini til frama fyri dygga barnaansing, men til tess er neyðugt, at hann, sum skipar fyri, leggur málini fyri nevnd til viðgerðar.

# Játtanin til kvøldskúlan skorin

**Dan Lamhauge**

Nú, játtanin til kvøldskúlan er skorin við nøkrum hundraðtúsund krónum, er tað greitt, at onki tilboð verður fyri fólk við breki.

Tað er at harmast um, at samgongan vil skerja játtanina til kvøldskúlan. Úrslitið er, at onki tilboð verður fyri fólk við breki. Eg havi seinastu 8 árini starvast á Tórshavnar Kvøldskúla, har eg havi undirvíst fólki við breki í ítrótt. Tað hava verið 8 ár við avbjóðingum, men sanniliga eisini við innihaldi og sannari lívsgleði. Ítrótt hevur nógv gott at geva fólki, motión, tekniskar førleikar og í hesum førinum hevur sosiala samveran sera stóran týdning. Ja, summi gleða seg eina heila viku til næstu tímarnir í ítrótt verða lisnir. Tey kunnu vera menningartarnað, ella sita kanska í koyristóli, hava fingið heilabløðing og eru lammað, ella hava á annan hátt merkt mótgang. Tey hava onki annað. Nú hoyrdi eg í útvarpinum, at landsstýrismaðurin visti at siga frá, at tey flestu ganga til fleiri ymsar lærugreinir á kvøldskúlanum. Tað úttalilsið sigur nokk um hugburðin hjá landstýrismanninum. Hann skal minnast til, at



ongin teirra fer at ganga á kvøldskúla í enskum, týskum ella føroyskum, har málið er at standa próvtøkuna, ongin teirra brúkar dansistøðini í vikuskiftinum, ongin teirra gongur á Margarinfabrikkini í Havn, ongin teirra sleppur at sparka fótbólt við ÍF ella nøkrum ørðum, ongin teirra syngur í nøkrum kóri, heldur ikki gentukórinum í Fuglafirðin, summi hava ikki ein gang eitt arbeiði at fara upp til. Tey hava ongi onnur tilboð enn kvøldskúlan. Men tað unnar landstýrismaðurin og samgongan ikki okkara veikastu. Man hevur ráð at brúka milliónir uppá at bjarga rækjuvinnuni, uttan at vita, um tað fer at eydnast, og man hevur ráð at seta ein tíðindafulltrúa í landstýrinum, men man hevur ikki ráð at lata nakrar hundraðtúsund krónur til kvøldskúla fyri fólk við breki. Tað er stórt spell, og eitt klárt afturstig í okkara vælferðarsamfelagi.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Katrin Wardum 60 ár



Týsdagin 28. september verður Katrin Wardum, frisør í Havn, 60 ár.

Katrin er av Signabø. Hon er næstelst av sjey systkjum, og foreldrini vóru Ingibjørg Geyti og Poul Niklái Johansen. Sum ung fór Katrin til Havnar í frisørlæru hjá frk. Djurhuus. Hon búði hjá William og Lisu Heinesen, og tey árini hava sett stóran dám á hennara lív.

Katrin giftist við Jóanis Wardum og saman fingu tey fýra børn: Hannis, Una, Rúnu og Bjarna Wardum. Katrin byrjaði sína egnu frisørsalong 1. desember 1971 í kjallaranum í húsunum á Heygsvegnum, og har hevur hon arbeitt síðan. Kundarnir hava verið trúgvir øll hesi árini, og Katrin hevur bæði verið vinkona og sálarhirði hjá mongum teirra.

Alt hevur tó ikki verið arbeiði - og langt frá tí. Katrin er sera virkin. Eitt náttúrubarn, sum gongur langar túrar í øllum veðri. Urtagarðurin blómar undir hennara kønu hond, og hon tekst nógv við at mála myndir. Katrin ger fimleik í Havnar Fimleikafelag og elskar at dansa. Og so er kórsangurin henni dýrabærur.

Men fram um alt er Katrin mamma. Børnini hava verið alt hjá henni, og tey hava higartil givið henni 8 ommubørn.

Katrin hevur síðan 1987 livað saman við Georg Egholm, lækna. Tey bæði hava ferðast nógv kring heimin saman og hava í tveimum umførum búð longri tíðarskeið so langt burturi sum í Suðurafrika. Samstundis er hon heimkærari enn tey flestu.

Nú Katrin Wardum rundar tey seksti heldur hon dagin saman við familjuni uttanlands.

# 456 Lisbergarar á ættarstevnu í Trongisvági



24 juli 2004 var ein merkisdagur fyri eftirkomarnir hjá Daniel Johan og Elini Lisberg í Smiðjuni í Fámjin. Tá møttust vit nevniliga til ættarstevnu í Høllini í Trongisvági.

Fólk komu víðani frá. Flest vóru sjálvandi úr Føroyum, men nógv komu eisini úr Danmark og eisini kom onkur líka úr USA.

Stevnan byrjaði kl.16 har vit møttust og komu at kenna hvønnannan. Eisini varð høvi til at síggja familjumyndir, samstundis sum høvið eisini var til at síggja eina framsýning um Jens Olivur Lisberg. Jens Olivur Lisberg er helst er tann kendasti av okkum, og tí var tað áhugavert at síggja lutir, ið hann hevur átt, samstundis sum yrkingar, stuttsøgur og annað hann hevur gjørt, eisini var sýnt framm. Merkið var sjálvandi eisini við.

Eitt diasshow við myndum úr Fámjin stóð eisini og lýsti uppá veggin.

Seinni tóku vit felagsmyndir og kl. 19 fóru vit inn í eina vælskrýdda ítróttarhøll, har allir teir 456 Lisbergarnir hildu eina rimmarveitslu, við góðum mati, nógvum sangum undirhaldi og talum.

Seinni var so dansur og eisini var farið upp á gólv. Veitslan vardi til tann ljósa morgun og fólk hugnaðu sær óført.

Vit sum fyrireikaðu tiltakið, vóru sera fegin um, at fólk tóku so væl undir við tí og møtti so talsterk upp og hjálptu væl til við at pynta, prenta sangir, rudda o.a.. Vit fingu eisini góða hjálp frá fólkunum í høllini og frá Tvøroyrar Kommunu, og hetta eru vit takksom fyri.

Samanumtikið kunnu vit siga, at vit høvdu ein sera hendingarríkan og hugnaligan dag saman.

Sum nevnt tóku vit myndir av veitsluluttakarunum. Eina felags mynd og so eisini myndir av teimum fimm greinunum hvør sær. Sum vituligt er, eru tað helst fleiri, ið ynskja at ogna sær hesar myndinar, og nú er møguleiki til tess.

Felagsmynd saman við einari av greinamyndunum kosta kr. 50. og ynskist felagsmynd og allar greinamyndinar, kosta hesar kr. 100.

Myndinar fáast við at flyta pengarnar á kontonr. 6460 1684924 í Føroya Banka. Viðmerk myndir.

Tey sum skrivaðu seg á myndalistan, mugu eisini flyta pengarnir á konto, áðrenn myndinar vera sendar.

Fyrireikararnir av ættarstevnuni hjá Lisbergarunum siga, at seinasta freist at biða um myndir er 15. oktober.

## Dagurin

**28. september. Vencelaus**, deyður í 935. Sonur hertogan Vratislav í Bøhmerlandi. Av øvund læt heidni bróðirin Boleslav hann myrða. Gjørdist verndarhalgimenni hjá Bøhmen og er jarðaður í Sankta Vensils Kapelli í Vituskirkjuni í Prag, sum er bygd oman á toftunum av tí rotundu, hann sjálvur læt byggja.

Føroyska navnið er Vensil. Hammersheimb-ættin kemur úr Bøhmerlandi, og Vensil próstur skrivaði navn sítt Venceslaus Ulricus Hammersheimb (1819-1909).

Navnið er slaviskt og merkir hin heiðurkrýndi.

*Lucas Debes doyði hendan dagin í 1675, 52 ára gamal.*

## Karolina Petersen 80 ár



Í gjár, mánadagin 27. september, varð Karolina Petersen 80 ár. Karolina hevur seinastu hálvu øldina verið í fremstu røð, tá ið tað hevur rátt um at arbeiða fyri at betra umstøðurnar hjá teimum brekaðu, og hon er eisini kend frá politiska lívinum.

Karolina er ættað av Toftum. Foreldrini vóru Sanna og Andreas Hansen, Andreas í Túni. Hon er gift við Peturi Petersen, presti, sum er ættaður úr Klaksvík. Tey eiga sonin Kára.

Miðskeiðis í fimti árunum fluttu tey aftur til Føroya, eftir at tey høvdu verið á flatlondum. Petur gjørdist prestur í Hvalvík, og Karolina fór undir virksemið í ALV, sum hon var fyristøðufólk fyri frá 1956 og fram til 1999. ALV helt til við Áir, og Karolina, væl stuðlað av manninum, arbeiddi nógv og miðvíst fyri at betra um umstøðurnar og møguleikarnar hjá teimum brekaðu. Dømini eru nógv um tey, sum við hjálp og stuðli frá Karolinu og Peturi og ALV komu á arbeiðsmarknaðin og um onnur, sum komu á rætta hill, eftir at sjúka ella brek hevði forðað teimum at verið í tí, sum tey frammanundan høvdu tikist við.

Umframt ALV legði Karolina í 1965 lunnar undir privata vistarheimið fyri brekað í Havnini, sum eisini í nógv ár hevði hølir við Toftavatn. Umframt í so mongum øðrum, so var hon eisini í fremstu røð, tá ið Hotel Tórshavn var latið upp í Keypmannahavn. Hon sá, at har var ein tørvur, sum ikki var nøktaður, og so tók hon stig til, at nakað varð gjørt við hetta. Hon var formaður í nevndini fyri hotellið frá 1976 og til 1986, og hon hevur eisini verið í stýrinum fyri Landssjúkrahúsið.

Eftir eina fjórðings øld í Hvalvík, fluttu Karolina og Petur fyrst í áttati árunum inn á Gjarðarnes, og har vóru tey, inntil Petur, sum 1. desember í fjør varð 80, legði frá sær orsaka av aldri, og tey fluttu til Havnar.

Frá 29. mars í 1988 og inntil í januar í 1989 var Karolina landsstýrismaður fyri Framsóknarflokkin, sum Adolf Hansen, sáli, var formaður fyri. Karolina umsat almannamál og kommunumál.

Føðingardagin skuldi Karolina halda saman við nøkrum av sínum næstu.

## Rúna Sivertsen tikið sæti á løgtingi



Fríggjadagin 24. september tók Rúna Sivertsen sæti á løgtingi fyri Jákup Mikkelsen, sum er á ST-aðalfundi í New York.

Hetta er fyrstu ferð, hon tekur sæti á tingi í hesum valskeiðinum, og verður hon við til 1. viðgerð av fíggjarlógini.

Rúna hevði fast sæti á tingi frá 1996 - 2002, og hevur síðani tá verið varafólk hjá fólkaflokkinum í Norðoyggjum.

## Prógv

Eyðna Mørkøre Joensen, Miðvági, hevur 26. aug. lokið prógv í samskifti og enskum (cand.com.) á Roskilde Universitet Center.